# Fyribyrgingarráðið www.fyribyrg.fo Spurnarkapping

*Í tubbaksroyki er:*

A) Kolsúrni (eiturgass, sum fer í blóðkyknurnar í staðin fyri súrevni - er lívshættisligt í stórum mongdum)
B) Benzen
C) Formaldehýd
D) Hydrogen cyankalium
E) Blýggj (eitrandi tungmetal)
F) Øll omanfyri nevndu evni

Svar F: Tann, sum roykir ein sigarettpakka um dagin, hevur í eitt ár anda hesi eiturevni í seg 50 - 60 túsund ferðir. Tað eru umleið 4.000 evni í tubbaksroyki, og nøkur tey hættisligastu eru: Kolsúrni, Benzen, Formaldehýd, Hydrogen cyankalium, og Blýggj.

*Keldu: http://www.ashline.org/ASH/cigsmoke/*

*Hvussu nógv tjøra legst í lunguni hjá einum fólki, sum roykir 20 sigarettir um dagin?*
*Umleið:*

A) 1 súpiskeið um árið
B) 3 súpiskeiðir um árið
C) 240 ml um árið
D) 240 ml yvir fimm ár

Svar C: Upp til umleið 240 ml av tjøru um árið leggjast í lunguni hjá einum sum roykir 20 sigarettir um dagin.

*Keldu: http://www.tarwars.org Curriculum: Experiments and Activities*



*Sigarettstubbar eru ein av teimum størstu rusktrupulleikunum. Hvussu langa tíð tekur tað at niðurbróta ein sigarettstubba?*

A) Eina viku
B) 1 mánað
C) 1 - 5 ár
D) 10 ár

Svar C: Tað tekur 1 - 5 ár at niðurbróta ein sigarettstubba.

Fakta: Á stóra ruddingardegnum í Australia (Clean Up Australia Day) eru sigarettstubbar tann størsti bólkurin av ruski, sum verður tikin upp, og í 2002 vóru sigarettstubbarnir 13,5% av øllum innsavnaða ruskinum. Filtrið er gjørt av plastevni og verður tí niðurbrotið seint.

*Keldu:*
*http://www.nswcc.org.au/cncrinfo/cncrsmrt/tobasmok/environment.htm#2bottom*
*http://www.cigarettelitter.org/index.asp?PageName=Facts*

*Børn, sum eru passivir roykjarar, eru í vanda fyri at fáa:*

A) Millumoyrnabruna
B) Bronkitis
C) Fleiri og ógvisligari astmatilburðir
D) Øll omanfyrinevndu

Svar D: Óvirkin royking er ein álvarsom hóttan móti heilsuni hjá børnum.

Pinku- og smábørn hjá roykjarum kenna tær mest álvarsomu fylgjurnar av óbeinleiðis royki. Hesi børn eru í øktum vanda fyri sjúkum í andaleiðini til dømis lungabruna og bronkitis. Børn, sum anda óbeinleiðis royk í seg, eru eisini í størri vanda fyri at fáa niðursetta lungafunktión og ertan í andaleiðini, til dømis hosta, slím og trongd. Óvirkin royking kann eisini føra við sær, at væta verður savnað í miðoyranum, og er hetta tann mest vanliga orsøkin til, at børn verða skurðviðgjørd. Børn, sum hava astma eru í serligum vanda. Óbeinleiðis roykur er orsøk til, at børn, ið hava astma, fáa fleiri og meira álvarsamar astmatilburðir, og børn, ið hava astma, verða meira asmatisk orsakað av óbeinleiðis royki.



# Marknaðarrák

Eingin rentulækking - á hesum sinni

Týsdagin 6. mei og hósdagin 8. mei høvdu ávíkavist amerikanski tjóðbankin (FED) og evropiski miðbankin (ECB) mánaðarliga rentufund teirra. Meðan avgerðin hjá FED hevði sera positiva ávirkan á lánsbrævamarknaðirnar, var ávirkanin frá ECB minni, og meira negativ. Hvørgin bankin broytti rentuna. Sjáldsamt var, at grundgevingin hjá FED tók støði í væntandi prísvøkstrinum í USA. FED metir, at búskapurin fer at betrast sum frálíður, men sagt varð eisini, at ógvusliga fallið í kjarnuprísvøksturinum (prísvøkstur undantikið orka og matvørur) er um at gerast ein hóttan móti rakstraravlopinum hjá amerikanskum virkjum. Heldur gongdin fram, vil FED lækka metlágu rentu teirra uppaftur meira. Hetta fekk lánsbrævarenturnar at fella sera nógv dagarnar eftir fundin í USA. Samstundis viknaði dollarin uppaftur meira mótvegis evruni.

Eftir fundin hjá ECB varð slakað eitt vet viðvíkjandi prísvakstrarmálinum á 2%.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,50% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,72% | -0,16% |
| 5 ára lánsbræv | 3,36% | -0,21% |
| 10 ára lánsbræv | 4,13% | -0,19% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 201,5 | -3,0% |
| OMX, Svøriki | 512,8 | -2,2% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2278,6 | -2,4% |
| S&P 500, USA | 933,4 | 0,7% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,8 | 0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 165,6 | 0,7% |
| Norrøn Partabrøv | 61,7 | -2,6% |
| Altjóða Partabrøv | 65,9 | -2,4% |

**Gjaldoyra**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 639,36 | -2,8% |
| EUR | 742,48 | 0,0% |
| GBP | 1029,90 | -2,5% |
| NOK | 94,11 | -0,2% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*

Illa stendur enn til í evropiska búskapinum, men ECB metir at búskapurin fer at koma seg seinni í ár. Hesi viðurskifti gjørdu at evropisk lánsbrøv fullu eftir tíðindafundin hjá ECB. Hóast evropiska rentan ikki var lækkað, er stórt sannlíkindi fyri at lækkingin kemur í juni - bæði í Evropa og Føroyum.

Partabrøv eru sum heild fallin seinastu vikuna, eitt nú orsakað av gongdini á lánsbrævamarknaðinum. Í vikuni hava bæði Danske Bank og Nordea kunngjørt roknskapir. Meðan roknskapurin hjá Danske Bank var góður hevði Nordea ikki nakað positivt at vísa á. (meira kann lesast um hetta í Útliti og Ráki hósdagin, sí www.kaupthing.fo)

Vit meta framvegis, at lánsbrøv komandi tíðina kunnu standa seg væl, hóast renturnar eru sera lágar. USA hevur í seinastuni havt størri ávirkan á marknaðirnar enn Evropa og hendan gongd kann halda áfram. Serliga metingin um amerikanska prísvøksturin stimbrar long lánsbrøv og stutt (varlig) lánsbrøv fara at standa seg hampuligt orsakað av komandi rentuniðursetingum.

Eftir roknskapirnar fyri fyrsta ársfjórðing 2003, hevur tað víst seg, at áhugin er vaksin fyri partabrøvum. Hesi fara tó neyvan at hækka ógvusliga restina av árinum. Tá tekin um, at búskapirnir betrast, gerast sjónligari, kunnu partabrøv tó hækka eitt vet. Hóast sveiggini á partabrævamarknaðunum seinastu tíðina eru minkaði, er váði kortini viðvíkjandi komandi partabrævagongdini.

Vika 19, 2003
www.kaupthing.fo



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Leitar eftir vinkonu frá Hull í 60-unum

Við Norrønu í gjár komu eini svensk hjún, Margretha og Lennart Petersson. Ein orsøk til vitjanina er at Margretha, f. Olsson, sum ung arbeiddi á sjómanskirjuni í Hull í Onglandi. Hetta var í 1960/61. Har kom hon at kenna eina føroyska gentu, sum búði hjá mostur síni í Hull, har hon passaði børn. Hon heldur at gentan var úr Havn. Um kvøldarnar hittust einir 5-6 norðurlendskir ungdómar, sum búðu har á leið, inni á svensku sjómanskirkjuni. Har komu Margretha og henda føroyska gentan at kennast sera væl. Margretha hevur ikki havt samband við føroysku gentuna síðan tá, men hon hevur ongantíð gloymt hana, og vónar hon at hitta hana, meðan tey eru her, ella at fáa at vita hvar hon bleiv av. Hon heldur at gentan er umleið 60 ár í dag. Tað hava nokk ikki verið nógvar føroyskar gentur, sum hava ansað børnum í Hull fyrst í 60-unum, so vónandi kann onkur av lesarum okkara hjálpa Margrethu Petersson at finna vinkonuna, áðrenn hon og maðurin fara avstað aftur við Norrønu fríggjamorgunin. Tey búgva á Hotel Føroyum, og teirra fartelefonnummar er 0046705438018



*Margretha og Lennart Petersson*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bussarnir koyra so leingi nøkur olja er




*Langar bíðirøðir hava verið við servicestøðirnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nú verkfallið hevur vart í nakrar dagar, er ein av avleiðingunum, at brennievni er við at ganga undan. Til dømis er ongin dieselolja at fáa í Havn, og lítið bensin er eftir**

BRENNIEVNI
*Magnus Gunnarsson*

Enn hava vit ikki merkt tað serliga væl í ferðsluni, at verkfall er, men nú fara olju- og bensingoymslurnar at tømast. Til dømis í Havn er ongin dieselolja at fáa á olju-og bensinstøðunum, og av bensini er heldur ikki nógv eftir. Frá Shell og Statoil verður sagt, at teir fyltu tangarnar upp áðrenn verkfallið. Tey sum koyra við dieselbilum kunnu freistast til at brúka dieselolju úr oljutanganum heima við hús til bilin, men hon kann einans brúkast til teir gomlu dieselbilarnar. Á teimum nýggju dieselbilunum eru innspræningpumpurnar sera viðbreknar, so tað verður rátt frá at brúka vanliga dieselolju, teir skulu brúka ta nýggju reinu dieseloljuna. Annars eigur tað at standa í instruktiónsbókini fyri bilin, hvat fyri olju hann kann brúka. Ikki øll øki í landinum verða líka hart rakt, á summum bygdum fæst olja og bensin. Bussarnir hjá Bygdaleiðum koyra sum vanligt, og Bussleiðin í Havn koyrir, so leingi nøkur olja er.

## Silvurbrúdleyp

Í dag, 13. mai, hava Sólfríð og Adolf Jacobsen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður undir Klakki 13 frá kl. 18.00.




*Hans Eivind Olsen og Jóhan Stenberg*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## SportsWear - nýggjur ítróttarhandil á Argjum

18. mars læt ein nýggjur ítróttarhandil upp á Argjum. Talan er um ítróttarhandilin SportsWear á Argjavegi 53. Tað eru teir báðir Hans Eivind Olsen og Jóhan Stenberg á Argjum, sum eiga handilin, ið selur ítróttarútgerð av merkjum sum t.d. Hummel, Prostar, Lotto, Asics. Eisini hava teir originalar ítróttartroyggjur til børn og vaksin til sera kappingarførar prísir. SportsWear letur útgerð til t.d. fótbóltsfeløg og róðrarfeløg. Teir prenta eisini á klæðir, bæði ítróttar- og arbeiðsklæðir. Eigararnir av handlinum hava báðir annað arbeiði og hava tí fólk at passa handilin. Hans Eivind Olsen er sølumaður hjá Havnar Timburhandli og Jóhan Stenberg er fólkaskúlalærari. Teir hava selt ítróttarútgerð síðan 1997.

## Niels Winther formaður í BLF

BLF, Búskapar-Løgfrøðingafelag Føroya, hevur havt aðalfund, og nýggj nevnd varð vald. Í henni sita: Atli Leo, Esther Dahl, Hans Ellefsen og Niels Winther, sum halda áfram í nevndini, og Durita Eliasen og Sigurð Ó. Vang, sum eru nývald. Úr nevndini eru farnir Bergur Berg og Hilmar Høgenni. Nevndin hevur skipað seg við Niels Winther sum formanni, Esther Dahl sum nevndarskrivara og Atla Leo sum kassameistara.

Niels Winther er úr Havn, sonur Annelise og Mads Winther. Hann 33 ára gamal, útbúgvin stjórnmálafrøðingur og hevur arbeitt í Vinnumálaráðnum seinastu fimm árini.



*Niels Winther, formaður í BLF*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Dagurin

13. mai. Ingenuus. Rómverskur kristin hermaður, sum keisarin Decius læt drepa.